# Hava latið 62.000 kr. til góð endamál

*Kiwanis klubburin í Tórshavn hevur aftur latið pening til vælgerðandi endamál, sum í mestan mun koma børnum til góðar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Kiwanis klubburin í Tórshavn hevur í seinastuni latið pening til trý ymisk, vælgerðandi endamál.

Kiwanis er ein felagsskapur, sum hevur til endamáls at stuðla vælgerðandi endamálum.

Skipað verður fyri ymsum tiltøkum at savna inn pening, sum síðani aftur verður latin til ymisk endamál.



*Her er tað Ina Frisdahl, leiðari á Hotel Tórshavn, sum tekur ímóti gávuni frá Eiriki Ingvardssyni, formanni í Kiwanis Tórshavn*

Hans Jacob Michelsen, sum er nevndarlimur í Kiwanis, sigur, at m.a. klubburin hevur nøkur afturvendandi tiltøk á skránni, eitt nú verður ein bátur burturlutaður á Ólavsøku, á jólum selja tey jólatrøð og í fleiri ár hava tey eisini skipað fyri marknaðardegi í Vágsbotni, í ár verður hann 3. juni.

Kiwanis leggur størsta dentin á at stuðla tiltøkum í Føroyum, og helst skal peningurin onkusvegna koma børnum til góða, tó at tað ikki er nøkur beinleiðis treyt.

Í seinastuni hevur felagsskapurin latið pening til trý ymisk endamál og tað mesta fór til endamál, um hevði við børn at gera.

Tilsamans eru 62.000 krónur lætnar í hesum umfarinum.

Fyrst hevur Hotel Tórshavn í Keypmannahavn fingið 32.000 krónur til at keypa ymiskt, sum kann gera uppihaldið hjá børnum eitt sindur lættari til børnini.

Tað liggja nógv børn á føroyska sjúklingahotellinum í Keypmannahavn, men har man tíðin mangan fella teimum long, tí umstøðurnar at stytta sær stundirnar, hava ikki verið nakað serligar.

Tí er peningurin, sum hotellið fekk, brúktur til at keypa sjónvørp, video, elektronisk spøl og annað til børnini.

Men eitt sindur av peninginum er eisini brúkast til at keypa barnavognar fyri, tí eisini har er hotellið illa fyri.

Og mánakvøldið fekk Kvinnuhúsið í Havn 10.000 krónur, sum skulu brúkast til leikur og annað, sum kann gera uppihaldið hjá teimum børnum, sum noyðast at gista har, eitt sindur lættari.

Og at enda hevur Herbergið hjá Frelsunnarherininum í Havn fingið 20.000 krónur.

Kiwain letur ikki hjálp ella stuðul eftir umsókn, tí tað eru limirnir í Kiwanis, sum sjálvir gera av, hvørjum endamálum, teir vilja stuðla.

Teir siga, at í Kiwanis siga tey, at tað verður gjølla umhugsa, hvar hjálp skal latast.

– Men tað kann ofta vera nokk so trupult, tí tað eru altíð nógv hugskot til viðgerðar hvørja ferð




*Kvinnuhúsið fekk 10.000 krónur til leikur og annað til børn, sum noyðast at gista har. Frá vinstru eru tað Eirikur Ingvardsson, formaður í Kiwanis, Tórshavn, Elin Planck Reinert, dagligur leiðari í kvinnuhúsinum, Edna Jørgensen, forkvinna í kvinnuhúsfelagnum og Ernst Samuelsen, skrivari í Kiwanis*




*Herbergið hjá Frelsunnarherinum fekk 10.000 krónur.F.v. eru tað Eirikur Ingvardsson, formaður í Kiwanis, Niels Edvard Olsen í Herberginum og Ernst Samuelsen skrivari í Kiwanis*

# Bygdarstevna í Hvalba hetta vikuskiftið

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú nærkast tíðin at summarstevnurnar verða.

Og hetta vikuskiftið verður lagt fyri við bygdarstevna í Hvalba, har ymiskt er á skránni, bæði til gamans og álvara.

Stevnan verður í morgin, Dýra biðidag og heldur fram leygardagin.

Hon byrjar við skrúðgongu seinnapartin í morgin kl. 2, og aftaná fer Bjarni Holm, fyrrverandi lærari í Havn, slektaður úr Hvalba, at seta stevnuna. Annars er eisini ætlanin at hava fólkafund ein av stevnudøgunum, eins og listaframsýning o.a.



*Tað verður Bjarni Holm, fyrrverandi lærari, ið er ættaður úr Hvalba, sum fer at seta bygdarstevnuna í Hvalba í morgin*

Annars verður skipað fyri ymsum spølum inni í Roynhøllini, eitt nú tombola, seymsláing, fiskibrunni o.a.

Uttanfyri Roynhøllina ber til at sleppa ein túr á hestbaki við Berghestum. Og um kvøldið verður útimøti og uppaftur seinni verður dansur. Fríggjakvøldið spælir orkestrið „All That Rain“, sum er sera væl umtókt hjá teimum yngru og leygarkvøldið spælir „Moonshots“, sum spælir dansitónleik fyri tey meiri tilkomnu.

Eyðvitað er nógvur fótbóltur á skránni á eini slíkari bygdastevnu. Talan verður bæði um dystir ímillum yngri lið og eldri lið. Men teir heilt gomlu sleppa eisini framat, tí ætlanin er at skipa fyri kapping ímillum „ Old Boys“ lið í oynni. Onkur skemtidystur verður helst eisini á skránni.

**Onki sum eitur**

Høvuðsdysturin verður fríggjakvøldið ímillum 2. deild hjá Royn og KÍ.

Tað hevur gingið syndarliga illa hjá Royn higartil í kappingini og eftir tríggjar dystir liggja teir nú í botninum. Men tað verður hesuferð, at gongdin skal vendast.

–Vit hava ikki verið misnøgdir við spælið, men tað hevur knípt at fáa mál, sigur liðskiparin, Lars Muller.

Spælararnir hava havt fund um støðuna og har er semja um at kempa meiri fyri betri úrslitum og hesuferð skulu vit hava trý stig, tað er onki sum eitur.

Men hann hevur góðar vónir, hóast tað hevur gingið illa. Arbeitt verður eisini fyri at styrkja liðið við onkrum spælara afturat, men tað er ikki avgreitt enn.



# Eitt slag av royndarstøð

*Eyðun Johannesen er frá 1. apríl settur sum listarligur leiðari á Leikpalli Føroya og frá 1. maj tók Jenny C. Petersen við starvinum sum fyrisitingarligur leiðari. Listarligi leiðarin dylir ikki, at hóast avgerðin um Tjóðpall er politisk, so er hetta ein trilvandi roynd ímóti tjóðpalli og hann samananber við eina royndarstøð*



DAGFINN OLSEN

Tann 1. apríl tók Eyðun Johannesen við sum leiklistarligur leiðari á Leikpalli Føroya, sum húsast í Gamla Meiarínum í Havn.

Tann 1. maj tók Jenny Petersen við sum fyrisitingarligur leiðari. Bæði hava royndir og palli í Føroyum og í útlondum. Felags fyri tey bæði er, at tey bæði hava starvast í útlondum og hava annars verið heima av og á.

Eyðun starvaðist eitt skifti fyrst í sjeytiárunum í Sjónleikarhúsinum í Havn. Hann var ein av stovnarunum av yrkisleikbólkinum Grímu í 1977. Síðani 1979 hevur hann mest starvast í Danmark og Noreg og Svøríki, og hevur havt viðrák.

Jenny hevur í 13 ár starvast innan sjónleik í Noreg. Eins og Eyðun hevur hon sjónleikarøtur sínar í Sjónleikarhúsinum.

**Royndarstøð**

Laura Joensen er forkvinna í nevndini fyri Leikpall Føroya. Hon metir starvssetanirnar sum eitt stórt stig á leiðini at fáa skipaði viðurskifti innan leik í Føroyum.

Hóast samd um, at spurningurin um Tjóðpall Føroya er nakað, ið eingin veruliga veit nakað um við vissu, so eru Laura, Eyðun og Jenny eisini samd um, at tey eru ávegis.

Tey meta tað, ið nú hendir, sum trilvandi royndir fram ímóti at seta á stovn tjóðpall.

Eyðun slær hetta fast við at mynda og samanbera virksemið og menningina á Meiarínum, við eina royndarstøð. Her skal finnast útav, hvussu eitt tjóðleikhús kann virka undir føroyskum umstøðum.

Tey leggja tó dent á, at enn er alt ógreitt viðvíkjandi tjóðpallinum. Hvar hann skal vera veit eingin. Munurin millum Leikpall Føroya og tjóðpall er, at tjóðpallur verður almennur stovnur. Í løtuni er Leikpallur Føroya ein fyritøka, ið fær almennan stuðul og sum arbeiðir í projektum.

Eyðun vísir á, at eingin teaturlóg er í Føroyum. Men arbeitt verður við at gera lóg um leiklist og tónlist, og ímeðan eru fólkini á Meiarínum spakuliga farin í gongd.

**Økt játtan**

Nýggju størvini er ein avleiðing av, at játtanin til Leikpallin er økt úr 1,7 millión til 2 milliónir. Hetta verður so nýtt til nýggju størvini, ið vónini um menning og virksemi.

Eyðun er settur í starv í 2 ár og Jenny í eitt ár. Jenny hevur sagt seg úr fasta starvinum í Noreg og Eyðun hevur sagt nei til uppgávur í Danmark. Tó hevur hann tryggjað sær, at hann hevur rúmd til at seta upp leikir aðrastaðni, umframt nýggja stav sítt. Hann skal m.a. seta upp leik á Kgl. leikhúsinum í Keypmannahavn.

Á Meiarínum vænta tey ikki, at gongdin innan sjónleikin kann skaða eittnú áhugaleikin. Heldur hinvegin. Og kemur Tjóðleikhús, so skal hetta virka sum orkumiðstøð, ið fólk uttanfyri eisini fáa gleði av.

Ovast á breddanum hjá nýggju leiðarunum er at fáa til vega føroyskar leikir.

Í løtuni er ein leikritakapping, har freistin at lata inn er 15. august í ár.

Eyðun Johannesen fegnast um, at Tórshavnar Kommuna hevur latið Meiaríið til leik og heldur nýggju menningina innan leik samsvara við nýggja mentanarálitið hjá Tórshavnar Býráð, har nevnd verður Tórsgøta sum livandi gøta, har caféir og annað longu er.

Eyðun vónar at fáa eitt livandi mentanarhús í Miðbýnum.



*Jenny C. Petersen og Eyðun Johannesen hava tikið við sum ávíkavist fyrisitingarligur leiðari og leiklistarligur leiðari á Leikpalli Føroya* **Mynd: Jens Kristian Vang**

# SKRÁ

## fyri bygdarstevnuna á Skála 19.–21. mai 2000

**Fríggjadagin**

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00 | Skála–GÍ kvinnur |
| Kl. 15.00 | Skála–ÍF 3. deild menn |
| Kl. 17.00 | Skála–HBb 4. deild menn |
| Kl. 21.00 | Ungdómsmøti í Meinigheitshúsinum – Café |

**Leygardagin**

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 | Smápiltar Eysturoyarøki 1 |
| Kl. 10.00 | Smápiltar Eysturoyarøki 2 |
| Kl. 11.30 | Smápiltar Eysturoyarøki 3 |
| Kl. 13.00 | Piltar Skála A–SÍ |
| Kl. 14.00 | Smádreingir Skála–B36 B |
| Kl. 15.30 | Dreingir Skála–B36 B |
| Kl. 16.00 | Suni Kristiansen setir stevnuna í Ítróttarhøllini |
| Kl. 16.00 | Politibilur, politimotorsúkkla, brandbilur og sjúkrabilur standa uttan fyri høllina |
| Kl. 16.00 | Tiltøk í Ítróttarhøllini: Tivoli við bamsutombola, tombola, 21-spæl, fiskidammur, hoppiborg og hamarslag. Ung listafólk sýna fram málningar |
| Kl. 16.30 | Trølla-Pætur verður avheintaður av Politinum uttan fyri høllina og verður førdur inn í høllina, har hann fer at undirhalda |
| Kl. 17.30 | Skemtidystur: Skipasmiðjan á Skála–Tórshavnar Skipasmiðja |
| Kl. 18.00 | Køku-vørutombola |
| Kl. 18.30 | Trølla-Pætur heldur fram |
| Kl. 19.30 | Eydnuhjól |
| Kl. 21.00 | Sámal Ravnsfjall syngur |
| Kl. 22.30 | Undirhald og felagssangur fyri ung eldri (havið Grønubók við) |
| Kl. 23.30 | Dansur í Ítróttarhøllini við »ALL THAT RAIN« |
| Kl. 23.30 | Gamlamannadansur í bygdarsalinum (í ítróttarhøllini) við »X-RAYS« |

**Sunnudagin**

| | |
|---|---|
| Kl. 11.00 | Gudstænasta í Skála kirkju við Jógvan Fríðriksson |
| Kl. 11.00 | Morgunmøti í Nerija |
| Kl. 14.00 | Súkklukapping fyri vaksin. Eftir kappingina verða heiðursmerki latin vinnaranum |
| Kl. 15.00 | Kappróður. Eftir róðurin verða steyp og heiðursmerki latin vinnandi bátunum |
| Kl. 15.00 | Tivoli letur upp á havnarøkinum, møguleiki er at keypa breyð og pylsur |
| Kl. 17.00 | Súkklukapping fyri børn á havnarøkinum. Heiðursmerki verða latin |
| Kl. 17.00 | Brotssparkskapping fyri børn og vaksin |
| Kl. 18.00 | Sjavskapping |
| Kl. 18.00 | Evangeliskt møti í Nerija |